## 10 DREYMAFERÐIR



Niels Uni Dam er 33 ár og blaðmaður á Sosialinum. Honum dámar væl at ferðast og hann hevur ferðast rættiliga fitt í lívi sínum, mest kring Evropa men eisini eitt so fjarskotið stað sum Ný Sæland. Í hesum døgum sigur Niels Uni okkum 10 ferðamál, ið hann hevur hug at vitja. Hann sigur, at hetta verður eitt gott bland av støðum, ið hann hevur vitjað og vil vitja aftur, støðum, ið hann ongantíð hevur vitjað, men kundi hugsað sær at vitjað.

Dreymaferð nr. 9

# Reykjavík, Ísland



Eg havi verið í Íslandi og serliga Reykjavík sera ofta. Eg vitjaði familju í Reykjavík nógv summar í barnaárunum, og eg gjørdist bergtikin av býnum longu tá. Eg havi í arbeiðsørindum vitjað aftur fleiri ferðir sum vaksin, men havi ikki veruliga havt høvið at vitja býin sum ferðafólk seinnu árini. Tað hevði eg fegin vilja. Eg havi bæði vinir og familju har, ið eg heldur enn fegin vildi sloppið at vitja. Býurin hevur øgiliga nógva sjarmu, og so eru íslendingar eitt av fittastu fólkasløgum, ið eg kenni, tað tykist sum um, teir hava eina sterka kenslu av brøðralagi við føroyingar.

Stutt er úr Reykjavík til eitt av teimum kulastu støðunum, ið eg havi vitjað nevniliga Bláu Lón.

Náttarlívið í Reykjavík er somuleiðis frálíkt við nógvum góðum spælistøðum og býurin hevur nógvar góðar matstovur. T.d. at bjóða konuni út á matstovuna á Viðey hevði verið ómetaliga romantiskt, túrurin við báti út á Oynna, ein gongutúr runt á henni og so fantastiski maturin í ótrúligu kørmunum, tað verður ikki nógv hugnaligari enn tað.




















